LM-047/2020

tylsiskjal 2.

Kommunufelagið

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Boks 2039
100 Tórshavn

Dagfesting
2. oktober 2020

Okkara j.nr.

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j. nr. 20/0411

**Viðv.: uppskoti til broytingar í lóg um ferðslu**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskot til broyting í ferðslulógini (Broyting av allýsingini av lendisakførum, atgongd til upplýsingar úr Akfarsskránni, umbýtan av bretskum koyrikorti til føroyskt koyrikort, broyting í heimildunum hjá landsstýrismanninum og broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan) sum Fíggjarmálaráðið hevur sent út til hoyringar.

Kommunufelagið tekur undir við ætlaðu broytingunum, men hevur tó fylgjandi viðmerkingar til fyriliggjandi uppskotið:

Í lógaruppskotinum er ásett í § 1 nr. 5 ( broyting í § 11b stk. 1) eru kommunurnar settar sum nr. 7 á listanum yvir almennar myndugleikar, sum fáa atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni. í serligu viðmerkingunum til hesa somu áseting ( á síðu 12 og 13) er okkurt helst gloppið í raðfylgjuni, soleiðis at hon ikki samsvarar við raðfylgjuna í sjálvari ásetingini.

Í serligu viðmerkingini undir punkt 6 (sum helst skal vera punkt 7) er viðmerkt, at "Tórshavnar kommuna, sum ynskir elektroniska atgongd til upplýsingar um nummarspjøldur og eigarar í akfarsskránni í sambandi við at veita parkeringsloyvi til íbúgvar í miðbýnum."

Viðmerkingin kann fatast avmarkandi í mun til, at sjálv ásetingin ivaleyst er ætlað at fevna um allar kommunurnar. Gott hevði tí verið, um hetta varð nágreinað í viðmerkingunum.

Viðvíkjandi nýtsluni av hesi heimildini, so er tað møguliga eisini óneyðuga avmarkandi at vísa til eitt einstakt nýtslutilfeldi – í hesum føri parkeringsloyvi – um ætlanin er, at kommunur, eins og aðrir almennir myndugleikar, skulu kunna nýta upplýsingar úr skipanini, um henda nýtsla er neyðug og saklig í myndugleikaviðgerðini. Helst átti ásetingin ella viðmerkingarnar tí at verið rúmsáttari, soleiðis at ásetingin eisini fevndi um støður, har kommunur hava lógliga og sakliga grund at fáa upplýsingarnar úr skránni.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

LM-047/2020

Kommunufelagið

Í § 27 í fyristingarlógini er heimild undir ávísum treytum at lata trúnaðarupplýsingar millum fyrisitingarligar myndugleikar. Víst verður til § 27 í fyrisitingarlógini og gott hevði verið, um tað í viðmerkingunum sást, hvussu ásetingin í § 11b skal skiljast í mun til § 27 í fyrisitingarlógini.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo